Skattaspurningar



Regin Thomsen svarar

Loysir tað seg at fara yvir til roknaðan skatt?

Í 1977 hevði eg eina inntøku uppá 73.277,91 kr. Útreiðslurnar vóru 2.126,00 kr. og goldin skattur í 1977 var 13.490,- kr.

Í 1978 verður inntøkan væntandi 68.800 kr. Eg eri fastlønt, eigi 1 barn. Hvat vil R.T. ráða mær til? Loysir tað seg í hesum føri at fara yvir til roknaðan skatt?

H. J.

Svar:

Um roknað verður við, at tygum búgva í Tórshavnar kommunu, kann spurningurin verða svaraður soleiðis:

Av inntøkuni í 1977 koma tygum at rinda:

1. um goldin skattur verður frádrigin kr. 35.723
2. um roknaður skattur verður frádrigin **kr. 24.710.**

Her eru sostatt spardar kr. 11.013.

Tíverri var eitt tal komið skeivt fyri í einum brævi til skattaspurnarkassan í leygardagsblaðnum. Í niðanfyristandandi spurningi stóð, at væntaða inntøkan í 1978 var 80.800, men rætta talið skal vera 68.800. Tølini í svarinum vóru kortini røtt, men fyri at lesarnir kunnu fáa ta røttu fatanina av spurninginum, taka vit spurningin og svarið upp aftur her. Vit biðja lesarnar orsakað henda skrivifeil.

Eigi eg at gjalda 50% í skatti?

Í 1976 hevði eg eina skattskylduga inntøku uppá 19.660 (harav goldin skattur í árinum var 4.310 kr.). Av hesum fekk eg ein skatt uppá 10.240 kr.

Nú vil eg spyrja, um tað er vanligt, at ein láginntøka verður skattað við yvir 50%.

Eg búgvi í Havn. Eg kann viðmerkja, at eg flutti til Føroya 31. mars 1975 eftir at hava verið uttanlands í 13 ár.

Misnøgdur

Svar:

Um tygum, av eini skattskyldugari inntøku fyri inntøkuárið 1976 (skattaárið 1977/78) hava fingið álíknaðan ein skatt uppá **kr. 10.240,—**, man orsøkin helst verða tann, at kommunala líkningarvaldið hevur funnið onkran skeivleika við sjálvuppgivnu inntøku tygara, og av teirri grund hækkað inntøkuna, soleiðis at samlaða skattaheildin hevur verið kr. 10.240,—.

Um tygum í Tórshavnar kommunu vórðu settur í skatt av eini skattskyldugari inntøku uppá kr. 19.600,— og tygum vórðu leysur (ikki-uppihaldari), vildi tann samlaði álíknaði skatturin verið **kr. 7.037,—**.

R.T.

★ ★ ★

Um tygum velja at halda áfram í gomlu skipanini, kunnu tygum burturav inntøkuni í 1978 draga tann goldna skattin fyri 1977, og um roknað verður við, at tygum hava goldið allar **kr. 35.723** fáa tygum í hesum føri eina skattaheild roknaða av inntøkuni í 1978 uppá kr. 12.568.

Men um tygum eru farin undir roknaðan skattafrádrátt verður skattaheildin tilsvarandi **kr. kr. 22.679.**

Í hesum føri verður meirgjaldið kr. 10.129.

Samandrigið kann sostatt verða sagt, at fyri bæði árini samanlagt koma tygum at spara **kr. 884,—** um tygum fara yvir til at nýta roknaðan skattafrádrátt. Tilskilast skal, at her er ikki roknað við kirkjuskatti.

Um tygum nú ikki hava goldið allar álíknaðu kr. **35.723,** men bert tey í 1978 falnu 7 gjøldini ella **kr. 25.006,—**, verða hesar at draga frá ístaðin, og verður skattaheildin tá av inntøkuni í 1978 **kr. 21.445,** og hava tygum í tí førinum, við at fara yvir til roknaðan skattafrádrátt, spart **kr. 9.761,—** samanlagt fyri bæði árini.

R. T.

Seinasta freist at lata sjálvuppgávuna inn er í dag

Freistin eigur avgjørt at verða hildin, sigur Líkningarráðið

Í seinasta lagi á midnátt í kvøld skal sjálvuppgávan hjá vanligu skattgjaldarunum, sum ikki hava bókhaldsskyldu, verða kommunalu líkningarvaldunum í hendi. Fyri bókhaldsskyldug er innlatingarfreistin 1. mars.

Freistirnar fyri at lata sjálvuppgávurnar inn, vórðu frá í fjør longdar við einum mánaða, soleiðis at tær nú eru 15. februar fyri vanligar skattgjaldarar og 1. mars fyri skattgjaldarar við bókhaldsskyldu.

Eyðun á Rógvi Olsen, stjóri á Líkningarráðnum segði herfyri í samrøðu við Sosialin, at freistirnar avgjørt eiga at verða hildnar.

Hann sigur, at líkningarráðið metir, at innlatingarfreistirnar nú eru rímiligar, og at ráðið fer at seta strangari krøv til at tær verða hildnar.

Sekt

Líkningarráðið hevur heimild til at geva skattgjaldarum eina sekt, sum svarar til eitt prosent av skattinum, fyri hvønn dag, sum gongur út yvir freistina. Henda sekt má tó ikki verða størri enn 10% av skattinum ella størri enn 5.000 kr.

Um sjálvuppgávan als ikki verður latin inn, verður inntøkan sett 25% hægri enn tann inntøkan, sum líkningarvaldið veit um ella ætlar um. Inntøkan skal í tílíkum førum eisini setast í minsta lagi 25% hægri enn árið frammanundan.

★ ★ ★

Hall á skattauppgerðini


Vit eru tvey ungfólk, sum liva saman ógift. Genta mín hevur ikki havt nakra inntøku í 1977. Í hesum tiðarskeiði havi eg goldið sjúkrakassa, skatt o.a. fyri hana.

Hvussu kann hetta dragast frá í skatti. Eg kann ikki draga tað frá, men kann hon draga hesar útreiðslur frá á sjálvuppgávuni. Skal hon eisini uppgeva tann pening, sum eg havi goldið fyri hana, sum gávu?

P.

Tvey, ið liva saman uttan at vera gift, verða sett í skatt hvørt sær.

Um drongurin rindar útreiðslur fyri gentuna, tí hon í einum tíðarbili ikki hevur havt inntøku, kann hann ikki draga hetta frá á sjálvuppgávu síni.


Sjálvuppgáva 1978/79

INNTØKUR

Gentan kann á sjálvuppgávu síni draga frá tær útreiðslur ið goldnar eru, og sum koma undir vanligar skattligar frádráttir, uttan mun til um hon hevur goldið teir við peningi hon sjálv hevur vunnið, ella um hon møguliga hevur lánt peningin at gjalda hesar við.

Samb. § 9, 11. petti í skattalógini er henni síðani loyvt, um hon tað eina árið á sjálvuppgávuni bert hevur útreiðslur og ongar inntøkur, at draga hetta **hall á skattauppgerðini** frá í skattleggjandi inntøkuni trý tey næstu árini, soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um inntøka er til tess og annars so nógv, sum inntøka er til.

Til tann seinasta spurningin skal verða sagt, at í »prinsippinum« er slík gáva skattskyldug hjá gentuni, og skal verða uppgivin sum sovorðin.

R. T.